## GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Sunny**
1.4 LX, brúnur, 4 hurðar, árg. 1992, 119.000 km.
**57.000**

**Nissan Sunny**
1.4 LX, bláur, 4 hurðar, árg. 1990, 90.000 km.
**8.000**

**Peugeot**
205 GRD, ljósabláur, 5 hurð. árg. 1993, 150.000 km.
**55.000**

**Peugeot**
306 GTi Premium, svartur, 3 h., árg. 1999, 10.000 km.
**180.000**

**Peugeot**
306 Style 1.6, bláur, 5 hurð., árg. 1996, 60.000 km.
**100.000**

**Suzuki Baleno**
1.3 GL, bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 22.000 km.
**118.000**

**Nissan Almera**
1.6 SR, svartur, 3 hurðar, árg. 1996, 41.000 km.
**92.000**

**Toyota Corolla**
1.3, blágrønur, 3 hurðar, árg. 1998, 22.000 km.
**112.000**

Bilarnir finnast eisini á: **www.nissan.fo**

**P/f Meinhardt Arge**
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin

## Fráboðan um umhvørvis-góðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 23. mai 2000, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 54, grein 1, stk. 4, hevur góðkent:

**Alistøðina hjá P/F Sumba Laks á Trongisvágsfirði**

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Debesartrøð, 100 Tórshavn, innan 4 vikur frá dags dato.

**Heilsufrøðiliga starvsstovan**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

## FÓLK SØKIST

**Søkt verður eftir fólki at arbeiða í Matstovuni, í Pizza Cafe'ini, og hjálparfólki. Arbeitt verður í vaktum og annað hvørt vikuskifti.**

**Meira fæst at vita um arbeiði, við at ringja á tel. 350000 att.: Njal**

**HOTEL TÓRSHAVNAR SJÓMANSHEIM**
Tel. 350000

Sosialurin - 311820

## Árligi marknaðardagurin

verður í Vágsbotni 3. mai við m.a. rógving, kúlubað, sjókar við livandi fiski, fuglabergi, matsølu o.m.a.

Eisini verður nýggi brandbilurin vístur fram. Opið er frá kl. 10-18. Nógv ókeypis tiltøk.

Vegna luttakandi feløgini
**Kiwanis**

## Avloysari fyri leiðara á sambýlinum á Fugloyarvegi 9

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari í Sambýlinum á Fugloyarvegi 9 og tilhoyrandi sambýlum, er eitt avloysarastarv sum leiðari í tíðarskeiðinum frá 1. september 2000 til 1. juli 2001 leyst at søkja.

Starvið er skipað eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, lønt í lønarflokki 27 + viðbót.

Talan er um trý ymisk sambýli undir somu leiðslu, har tað búgva tilsamans 19 menningartarnað fólk, sum hava brúk fyri hjálp í tí dagliga. Uppgávan hjá leiðaranum er, saman við starvsfólkunum, at skipa ein tryggan og mennandi gerandisdag fyri íbúgvarnar.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av sambýlunum.

Væntað verður av leiðaranum, at hann á virknan hátt, saman við starvsfólkunum kann tryggja sambýlinum eina positiva menning.

Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur royndir á økinum, evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja størvini.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bjarna Clementsen á tlf. 31 54 26.

Umsóknarfreistin er 15. juni 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
**Sigmundargøtu 5**
**FO-100 Tórshavn**

## Neyst í Fuglafirði

til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 444048,** best eftir kl. 18

## Honda Civic 1.4i til sølu



Ein bilur í besta standi og sær út sum nýggjur. Bilurin er frá mai 1997.

**Meiri fæst at vita á tlf. 21 82 46 ella 44 11 26**

## Leiðari og varaleiðari til sambýli á Serforsorgarøkinum

Innan Almanna- og Heilsumálastýrið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á einum sambýli fyri brekað í Havn, er eitt tænastumannastarv sum leiðari og eitt sum varaleiðari leyst at søkja til setan 1. juli ella 1. august 2000.

Størvini verða sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag, leiðarastarvið lønt í lønarflokki 26 + viðbót og varaleiðarastarvið lønt í lønarflokki 20 + viðbót.

Sambýlið er undir uppbyggjan, men væntast at verða heim hjá 5 ella 6 fólkum við serligum tørvi vegna sálarligar trupulleikar. Uppgávan hjá leiðaranum er, saman við starvsfólkunum, at skipa ein tryggan og mennandi gerandisdag fyri íbúgvarnar.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av sambýlinum. Uppgávan hjá varðaleiðaranum er at stuðla leiðaranum í leiðsluarbeiðinum og at yvirtaka leiðarans uppgávur, tá hesin ikki er til staðar.

Væntað verður av leiðaranum, at hann á ein leiðandi og virknan hátt, saman við starvsfólkunum kann tryggja sambýlinum eina positiva menning.

Týdningur verður lagdur á, at umsøkjarin hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir á pedagogiska økinum, hevur evni og vilja at samstarva á øllum økjum, er sjónligur í sínum leiðarastarvi og dugir at fáa síni sjónarmið fram.

Væntað verður av varaleiðaranum, at hann hevur samstarvsevni, vilja og evni at fáa arbeiðið í gerandisdegnum at ganga so væl sum gjørligt.

Bert fólk við pedagogútbúgving kunnu søkja størvini.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Bjarna Clementsen á tlf. 315426. Umsóknarfreistin er 20. juni 2000.

Umsóknir skulu sendast til:

**Serstovnadeildina**
Sigmundargøtu 5
FO-100 Tórshavn

## Mercedes 190E til sølu



2,3 turbo, intercooler, bensinmotor, vínreyður, prísur kr. 85.000,-

**Telefon nr. 281002 og 448979**

# Norðoyastevnan 2000

## Prestur gleðir seg



MYND: JENS KRISTIAN VANG

Hans Eiler Hammer ætlar at halda norðoyastevnuna saman við familjuni, men hann heldur, at tað er ov nógv fyllskapur á stevnunum. Les síðu 16 & 17

## Dansur og undirhald



MYND: JENS KRISTIAN VANG

Rudolf Joensen stendur í ár fyri Norðoyastevnuteitinum, og hann sigur, at teitið fer væl við klaksvíkingum. Tað er lætt at genera fólk, men tað riggar ikki sum undirhald, sigur hann. Les á síðu12



MYND: JENS KRISTIAN VANG

# Karl Martin stórtrívist á pallinum

*Les stevnuprátið á miðsíðunum*